## VIÐMERKINGAR

# Vit eru nøkur, sum enn fylgja við



Bárður Persson

Aftur og aftur undrar tað meg, at Tjóveldisflokkurin, við Høgna á odda, so siðiliga og sakliga megnar at standa ímóti dagligu álopunum frá einari hatursspiltari samgongu, ið einans hevur ein vilja nevnliga at knúska siðiliga og sakliga fullveldisarbeiðið. Einari samgongu av trimum altkøvandi flokkum, ið einans megna at byggja sín politikk á afturvendandi breyðpolitik og panikkenda íegnan-lumma-spekulatión.

Og undir viðgerðini av ólavsøkuroðuni vísti hendan samgongan enn einaferð sítt sanna andlit. Ferð aftan á ferð varð politiska kjakið á mest primitivan hátt knúlvað niður á lægsta punkt, hvørja ferð ein veruligur glotti var at hóma.

Teir veruligu visiónirnar, ið bóru síni hjartamál fram á seriøsan hátt, vórðu ferð aftan á ferð fullkomiliga niðurgjørdar og úttalilsi teirra feiaði burtur við hjálp av innantómum og lygnasnikkaðum álopum - og hetta so sjónligt, at tann, ið bert hevur eitt lítið vet av ánilsi av, hvar føroyskur politikkur »flýtur« í løtuni, alt fyri eitt hevur gjøgnumskáðað tað, hendan samgongan veruliga vil, - nevnliga at avvisiónera allar føroyingar, og gera Føroyaland til eitt nissuland, sum til eina og hvørja tíð kann neyðtakast úti á handils-, vinnu- og uttanríkispolitiska víðvøllinum.

Og hvussu síggja so byggisteinarnir út, sum hendan fyri-ein-og-hvønn-prís-samda samgongan er bygd á.

### Eitt sindur um teir tríggjar

Sambandsflokkurin: Ein **útdoyggjandi og hjálparleysur dinosaurus**, ið kennir tað sum eina marru at fara nýggjar leiðir og eina ódygd at seta seg inn í politisk mál, og útfrá hesum grundstøði taka veruliga ábyrgd.

Fólkaflokkurin: Ein **liberal-kommunistiskur svansiflokkur** við skítfullari last av svansi, ið ger, at teir í eini og hvørjari SVANSIstøðu kenna seg noyddir at halda hondina hvør yvir øðrum, hvussu svansut politiska talvið so enn er.

Og at enda einum **neyðtiknum hvørkikyni av einum hugsjónarfalleraðum javnaðarflokki**, ið alt meir og meir letur seg selja til tann »sterkasta«, og alt meir og meir missir sambandið við tann veika í samfelagnum - ikki minst »óupplýsta« verkamannin. Men góðu »sokallaðu« javnaðarpolitikkarar minnist til, at tað eru hansara hartvunnu skattakrónur, ið gjalda tykkara feitu og til tíðir onki afturgevandi elitulønir.

### Og her at enda til Høgna og hini

Enn eru vit í øllum førum nøkur, sum dagliga fylgja við og væl duga at skilja perlurnar frá svínunum.Verið stinn og haldið áfram. Undirtøkan til flokkin er alsamt vaksandi millum tey ungu, og tað er her framtíðin liggur.

Við vón um framtíð bygda á rugbreyðspolitikk og egið tilfeingið - og hetta í seinasta lagið í ár 2015.

# Ein stór tøkk til Edmund Joensen



Høgni Hoydal

Fyrst av øllum vil eg takka Edmundi Joensen, løgtingsformanni, fyri, at hann váttar tær staðfestingar, ið eg gjørdi í einum lesarabrævi herfyri. Edmund Joensen váttar, at hann sjálvur var við til at leggja uppskotið um tingmannalønir fram í 1999, og at hann síðani av populistiskum orsøkum valdi at atkvøða nei, tá hann var vísur í, at uppskotið fekk meiriluta. Somuleiðis váttar hann, at fullveldislandsstýrið hevði ongan lut í hesum uppskoti, soleiðis sum eg vísti á, at hann hevði sagt ósatt um.

Eisini fari eg at takka Edmundi Joensen fyri, at hann prógvar, hvussu lágt vit ríða í føroyskum politikki við sjálvum løgtingsformanninum á odda. Tað var hetta, sum grein mín snúði seg um.

Løgtingsformaðurin hevur av ókendum orsøkum valt at leypa á vanligar borgarar í hesum landi, sum tora at siga sína hugsan alment. Hann hevur sett spjaldur á teir sum "fullveldisýlarar" og lagt teir undir at hava svárar sjúkur. Hann hevur givið hesum fólkum skyldina fyri, at tingmannalønirnar hækkaðu. Hartil hevur hann gjørt gjøldur burturúr eini av ringastu náttúruvanlukkum í heiminum - tsunamiflóðalduni - í sínum royndum at háða fólk, ið taka lut í almenna orðaskiftinum.

### Løgtingsformaðurin undir gáttina

Í míni grein helt eg, at løgtingsformaðurin við hesum lækkaði tingsins tign millum fólk. Eg síggi nú, at eg tók ov varliga til. Ikki bara lækkar gáttin. Løgtingsformaðurin fer undir gáttina í sínum aftursvari til mín.

Edmund Joensen vil nú vera við, at tað er hann sum er álopin - hóast tað var hann, ið legði eftir hampafólki, ið høvdu sagt sína hugsan um politiskar raðfestingar. Hann vil nú vera við, at tey skilafólkini, ið hava skrivað um politiskar raðfestingar "eru úti eftir honum" og at onkur hevur sent tey eftir honum.

Og so megnar løgtingsformaðurin enn einaferð at brúka tann standard, sum vit kenna úr skúlagarðinum: Tá ið onkur hevur tapt eitt orðaskifti, so leggur hann bara eftir onkrum øðrum óviðkomandi máli og sigur: Beiggi tín er býttur!" Ella: "Mamma tín er ljót!" ella okkurt tílíkt, sum onki hevur við málið at gera.

Edmund Joensen brúkar nú tað, at eg havi gjørt mítt arbeiði á fólkatingi. At eg havi sett fyrispurningar til ríkisumboðsmannin. Og at eg havi mótmælt teimum ómegdarlógum, ið Løgtingið skrumblaði ígjøgnum. Hetta brúkar hann í einum orðaskifti, sum snúði seg um, at løgtingsformaðurin hevur lopið á nakarar sakleysar borgarar og hevur lagt teir undir sínar egnu gerðir.

### Aðrar hugsanir skulu burturbeinast

Ja, hvat skal mann siga? Løgtingsformaðurin er valdur at umboða alt tingið og hann varð enntá valdur við atkvøðum frá andstøðuni.

Nú er hann fremsti talsmaður at siga alment, at eg havi ikki rætt at gera mítt arbeiði sum tjóðveldistingmaður og fólkatingsmaður við at seta fyrispurningar, leggja uppskotfram og føra tjóðveldispolitikk. Og hann spyr: Hvat verður tað næsta?

So vita vit tað, at tingfólk, ið hava aðra hugsan, enn Edmund Joensen, skulu ikki gera sítt arbeiði, men binda frið og tiga.

Og øll sum tora at finnast at sambandssamgonguni og hennara politikki, verða skírd "fullveldisýlarar" og fáa skyldina fyri alt, sum Edmund Joensen roynir at kasta Tjóðveldisflokkinum fyri.

Sanniliga er støðið høgt í føroyskum politikki, og løgtingsformaðurin stendur sum ein lýsandi fyrimynd fyri, hvussu vit skulu ganga undan at fáa fólk at hava áhuga fyri politikki. Men man endamálið ikki vera tað øvugta?

# Ráðharrar undirskrivað skjal um dupultskattaavtalu

**Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, og danski skattamálaráðharrin hava í dag undirskrivað eina protokoll til norðurlendsku dupultskattaavtaluna. Í stuttum merkir tað, at hýrur goldnar eftir FAS- og DIS-skipanunum verða skattliga javnsettar. Landsstýrismaðurin hevur eisini boðað frá, at Føroyar eru til reiðar at gerast partur av dupultskattaavtalum Danmarkar við Holland og Italia**

SKATTAMÁL

*Tíðindaskriv frá Fíggjarmálaráðnum*

Tey sum arbeiða á skipum skrásett í føroysku Altjóða Skipaskrásetingini (FAS) og Dansk Internationalt Skribsregister (DIS), verða frameftir sett javnt skattliga. Tað er greitt, eftir at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, og danski skattamálaráðharrin, Kristian Jensen, hava undirskrivað eina protokoll til norðurlendsku dupultskattaavtaluna. Undirskrivingin fór fram á einum fundi í Fíggjarmálaráðnum á Argjum í dag.

Ein dupultskattasáttmáli frá 1986, ið sleppir borgarum undan dupultskatti, er galdandi millum Norðurlond. Føroyar eru fevndar av sáttmálanum. Protokollin, ið varð undirskrivað í dag, er eitt ískoyti til norðurlendska sáttmálan, og skal bert galda millum Føroyar og Danmark.



Higartil hava inntøkur hjá føroyingum í starvi umborð á skipum, ið eru skrásett í DIS, verið undantiknar skatti í Føroyum, meðan inntøkur hjá dønum umborð á skipum, sum eru skrásett í FAS, hava verið skattaðar í Danmark

Á fundinum í dag vórðu eisini spurningar viðgjørdir í samband við at útvega Føroyum dupultskattaavtalur við onnur lond. Bárður Nielsen boðaði Kristian Jensen frá, at Føroyar nú eru til reiðar at gerast partur av dupultskattaavtalum Danmarkar við Holland og Italia. Kristian Jensen lovaði at gera sítt til at hesar avtalur kundu verða avgreiddar skjótt.

Arbeitt verður í løtuni við at fáa Føroyum lut í avtalunum, Danmark hevur við Týskland og Frakland.

Eisini lovaði Kristian Jensen at virka fyri, at Føroyar kunnu verða fevndar av OECD-hjálparavtaluni, sum ger tað møguligt hjá føroyska skattavaldinum at kanna ivamál og spurningar í øðrum londum.

"Dupultskattavtalur við onnur lond eru týðandi táttur í arbeiði okkara at standa okkum í altjóðargerðini og soleiðis eisini at røkka teimum málum, landsstýrið setir sær við "Visión 2015", sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður.

Dupultskattaavtalur hava tvey høvuðsendamál. Í fyrsta lagi skulu tær tryggja, at borgarar og fyritøkur ikki gjalda dupultan skatt, tá arbeitt verður í tveimum londum. Hitt endamálið er, at borgarar og fyritøkur hava fulla greiðu á skattligu avleiðingunum, tá tey taka avgerð um at fara undir virksemi í øðrum landi.